








# Atlanticpane við glasi og rammum




Glas- og rammuverksmiðjan Atlanticpane í Kollafirði er ein moderna fyritøka við framkomnum framleiðslutólum og sera góðari tænastu.

Tey flestu kenna Atlanticpane gjøgnum radiolýsingar og tann kenda álmannakkan, sum á hvørjum ári verður sendur til hvørt hús í landinum.

Atlanticpane hevur verið til síðan 1973, tá fyritøkan varð stovnað í Vestmanna. Síðan 1983 hevur Atlanticpane verið í Kollafirði. Talan er um eina fyritøku við fólki, sum eru serkøn í glasi og við síni framleiðslu koma kring alt landið.

Høvuðsframleiðslan hjá Atlanticpane er termorútar til vindeygu og hurðar umframt glasveggir til brúks bæði innan- og uttandura. Hesir verða nýttir til t.d. brúsukabinur, trappur, útbygningar og skrivstovur.

Termorútarnir hjá Atlanticpane eru gjørd við lágorkuglasi við lágum u-virði og halda væl upp á hitan inni í húsinum. Umframt termorútar framleiðir Atlanticpane eisini einkultglas, spegl, sólverja til bygningar, bátarútar, maskinrútar og ferðslu- og trygdarspegl.

Atlanticpane er ein moderna fyritøka við framkomnum framleiðslutólum og sera góðari tænastu. Um kundin kennir seg ótryggan viðvíkjandi mátum á vindeygum og hurðum, koma fólk frá fyritøkuni á staðið og taka mát.

Atlanticpane hevur eina deild til innramming av myndum og plakatum, eins og laminering av myndum. Í hesum sambandi er eisini ein handil, har m.a. rammur, plakatir og stór heimskort eru at fáa. Í handlinum eru nógv góð jólagávuhugskot.